

Oljukortið. Kelda: Rystad Energy og E24

# Lágur oljuprísur: Bara tvey nýggj oljuøkir loysa seg í Noregi

**Jógvan Hugo Gardar**

14.12.2015 - 14:10

Oljan.fo

Av 20 nýggjum oljuøkjum sum eru undir útbygging í norskum sjógvi, so eru bara tvey økir sum í løtuni loysa seg at byggja út. Av teimum 20 eru bara økini Edvard Grieg og Maria sum eru grøn. Øll hini eru reyð, og tað merkir at við dagsins oljuprísi so gevur útbyggingin undirskot, tí oljuprísurin liggur lægri enn tað oljufeløgini hava mett skal til fyri at ætlanin skal bera seg.

Tað mest áhugaverda í dag er at risaútbyggingin Johan Sverdrup, ið Statoil stendur á odda fyri, nú eisini er vorðin reyð. Á kortini niðanfyri liggur vísir oljuprísurin 36,73 dollarar fyri fatið av Norðsjóbvaroljuni Brent. Tað eru 27 cent lægri enn tað mett verður at Johan Sverdrup ætlkanin krevur fyri at bera seg.

Oljukortið, sum E24 ger saman við Rystad energy vísir gongdina í oljuprísinum, og samanber oljuprísin við tað sum antin oljufeløgini hava sagt at tey meina at útbyggingin kostar, ella tað greinarar hava rokna seg fram til.

Statoil hevur ikki váttað at 37 dollarar fyri fatið er tann kostnaðurin tey mugu hava fyri at Johan Sverdrup skal bera seg. Einasta Statoil hevur sagt, er at markið liggur niðanfyri 40 dollarar.

At Johan Sverdrup nú er farin í reytt merkir ikki at broytingar skulu gerast í ætlanini. Morten Eek, kunningarmaður hjá Statoil-deildini sum stendur fyri leitivirkseminum í norskum sjógvi, sigur at ætlanin heldur fram sum ætlað. Hann vísir á at tey ikki fyrihalda seg til ein løtuprís á oljuni, men hava gjørt eina meting um kostnaðin yvir nógv ár, og Johan Sverdrup kemur at framleiða í fleiri tíggju ár.



Oljukortið. Kelda: Rystad Energy og E24